# Nýggja suðuroyarferjan fyri tingið í næstu framtíð



*- Hesar dagarnar verður síðsta hondin løgd á eina verklagslóg um nýggju suðuroyarferjuna. Lógin skal leggjast fyri tingið, sum so skal játta, at neyðugi peningurin verður brúktu*

**– Ein verklagslóg skal nú endaliga orðast og so verður hon løgd fyri tingið**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Tað verður kanska longu í næstu, ella í aðru viku, at Løgtingið fer at taka málið um nýggju suðuroyarferjuna til viðgerðar.

Landsstýrið er í hesum døgum í ferð við at orða eina verklagslóg (anleggslóg), sum skal leggjast fyri tingið.

Landstýrið hevur havt verklagslógina fyri á fundi og hon skal nú endaliga orðast.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at samgongan er framvegis samd um at byggja skipið, sum Strandferðslan hevur mælt til at byggja, tvs, eina ferju, sum tekur 200 bilar, er 135 metrar long og siglur 21 míl.

Løgtingið hevur fyrr samtykt at byggja eina suðuroyarferju, men tað var ein minni ferja enn hendan. Og av tí at hendan er dýrari, verður tað eisini neyðugt at fáa heimild frá tinginum at brúka tað neyðugu upphæddina til skipið.

Tað er hetta, sum er endamálið er við verklagslógini, sum nú verður løgd fram.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at eftir viðgerðini í Landsstýrinum í farnu viku, varð lógin send flokkunum til ummælis.

Men harafturat er ætlanin at allar almennar útbyggingar hereftir skulu niðurfellast í verklagslógir.

Tí er lógin viðvíkjandi suðuroyarskipinum eisini latin Løgmansskrivstovuni. Løgmansskrivstovan og Vinnumálastýrið skulu so í felag finna eina fastan form fyri, hvussu slíkar verklagslógir skulu orðast.

– Ætlanin er at finna eina fasta orðing, so at vit fáa ein samanhang í, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at tað eru so nógvar almennar útbyggingar, sum strekkja seg yvir fleiri fíggjarár.

Tí heldur hann eisini, at tað er rætt at hava eitt ítøkiligt lógargrundarlag at halda seg til, so at tað ikki er tað til eina og hvørja tíð galdandi politiska rákið frá ári til ár, sum ger av, hvussu nógv verður gjørt tað árið.

– Fara vit í holt við eina verkætlan, so fara vit í holt við hana og gera hana lidna, sigur hann.

Hetta snýr seg eisini um at hava trygd fyri, at tá farið verður undir eina útbygging, so verður hon gjørd liðug. Ikki minst hevur hetta týdning, tá ið almenn arbeiðið skulu bjóðast út og tað verður meiri og meiri av tí.

Bjarni Djurholm væntar, at málið verður liðugt viðgjørd í komandu viku. So verður hon aftur løgd fyri Landsstýrið, sum endaliga góðkennir lógina, áðrenn hon verður løgd fyri tingið.

Men landsstýrismaðurin vísir á, at hetta er ikki tí at slingur er komin í.

– Hetta málið er avgreitt og tað er avgjørt, hvussu skipið skal vera, sigur Bjarni Djurholm.

# Ongin avgerð um útbygging í Havn

**– Landsstýrið fer nú at viðgerða, um tað skal geva Tórshavnar Kommunu stuðul til at byggja havnarlagið út.**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*Næstan allur inn- og útflutningur í Føroyum gongur um havnina og tað setir stór krøv til útbygging. men enn er óvist um landskassin vil betala ein part*

Landsstýrið fer nú at taka støðu til, antin Tórshavnar Kommuna skal fáa stuðul til at byggja havnarlagið út fyri.

Nú bæåi nýggj Norrøna og nýggja suðuroyarferja kemur, verður neyðugt at byggja samferðsluhavnina á Bursatanga út fyri yvir 60 milliónir.

Skal havnin bara byggjast út til nýggja suðuroyarskipið, fer tað at kosta góðar 30 milliónir.

Tórshavnar Býráð heldur ikki, at tað skal betala hesar útbyggingarnar einsamøll. Harafturat heldur hon, at tann parturin, sum kommunan skal betala, ikki skal takast av útbyggingarkvotuni hjá kommununi upp á 70 milliónir.

Tórshavnar Býráð vísir á, at á Tvøroyri ætlar Landsstýrið at byggja nýggja samferðsluhavn til nýggju suðuroyarferjuna og tað heldur Býráðið eisini, at landið skal gera í Havn. Harafturat eru útbyggingarnar til Norrønu fyri alt landið og tí heldur Býráðið ikki, at tað er rímiligt, at tað verður tikið av útbyggingarkvotuni.

## Til viðgerðar

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at málið er nú til viðgerðar. Hann hevur sent málið til Landsverkfrøðingin, sum nú skal gera eina meting.

Fyrrenn hon er komin, vil Bjarni Djurholm onki siga.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur heldur onki greitt svar nú.

Hann vísir tó á, at hann er settur at arbeiða fyri føroyska búskapinum sum heild og tað ætlar hann sær at gera.

Hann vísir eisini á, at vit skulu vera serliga varin við at byggja út í høvuðsstaðnum, tí her er búskapurin heitast frammanundan.

Hinvegin vísir hann á, at so gott sum allir inn- og útflutningur í Føroyum gongur um Havnina og tað setir sera stór krøv til útbyggingar.

# Ætlar framvegis at fáa semju

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at enn er tað ikki ov seint at fáa javnaðarflokkin at taka undir við langtíðar útbyggingarætlanini**

ALMENNAR ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Karsten Hansen harmast um, at javnaðarflokkurin ikki hevur verið meiri uppi í arbeiðnum, men tað hevur sínar orsøkir. Og orsøkin er ikki, at ætlanin hevur verið at halda hann uttanfyri*

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ætlar framvegis at fáa so nógvar flokkar sum gjørligt at taka undir við langtíðar útbyggingarætlanini, sum samgongan arbeiðir við.

Tá er tað mest javnaðarflokkin hann hugsar um.

– Sambandsflokkurin hevur langt síðani boða frá, at hann er ikki sinnaður at vera við í arbeiðnum hjá samgonguni at gera eina langtíðar útbyggingarætlan.

Og Karsten Hansen heldur avgjørt ikki, at tað er ov seint at fáa javnaðarflokkin við, hóast tann eini javnaðartingmaðurin, Hans Pauli Strøm nú ein dagin segði í Sosialinum, at hann kundi spara sær ómakin.

Hetta segði løgtingsmaðurin, tí hann helt, at nú var nakað seint hjá landsstýrismanninum at gera vart við seg.

Hann vísti á, at nú fer fíggjarlógin til viðgerðar og enn hevur javnaðarflokkurin onki útspæl fingið frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Og hann gjørdi eisini greitt, at javnaðarflokkurin ætlaði sær ikki treytaleyst at verða stuðulsflokkur hjá samgonguni í hesum máli og at flokkurin fór ikki at taka undir við eini útbyggingarætlan, sum flokkurin ikki hevði havt høvi til at ávirka.

## Ikki ov seint

Karsten Hansen er ikki so svartskygdur um útlitini til at fáa eina breiða semju sum Hans Pauli Strøm er.

Hann sigur, at hann fer aftur at venda sær til javnaðarflokkin og hann heldur ikki, at tað er so langt ímillum partarnar.

– Vit hava tosað saman og vit hava givið teimum okkara útspæl fyrr í ár, eins og vit hava fingið eitt útspæl frá teimum.

– Eftir hesum at døma, er tað ikki so langt ímillum okkum.

Karsten Hansen vísir eisini á, at tað, sum stendur á fíggjarlógini, sum nú fer til prentingar, eru bara útbyggingarnar komandi ár og harafturat skal fíggjarlógin ikki samtykkjast, fyrrenn til jólar.

Men alt, sum er útyvir tað, er framvegis opið.

Karsten Hansen heldur, at tað er positivt, at javnaðarflokkurin vil vera við og hann sigur at tað er púra greitt, at hann aftur fer at venda sær til javnaðarflokkin.

Landsstýrismaðurin harmast um, at andstøðan ikki hevur verið meiri uppi í higartil, men tað hevur sínar orsøkir.

Orsøkin er, at tað hevur verið strilti at fáa samgonguna sjálva at semjast um eina slíka ætlan. Orsøkin er sostatt ikki, at ætlanin hevur verið at halda samgonguna uttanfyri.

– Tað er eyðsæð, at nógvur lokalpolitikkur kemur upp í eina slíka tilrættislegging. Og fyrrenn semja var í samgonguni, bar ikki til at fara til andstøðuna, sigur Karsten Hansen.

# ítróttur

Nr. 179 • týsdagur • 18. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



## Skála hevur fatur í 1. deild

# Ilt at fylgja málsviðgerðini

**Niðurstøðan í Jóhannis Joensen málinum setir fleiri spurnartekin, enn hon gevur svør. Leikarin er fríkendur í ákæruni, men hevur kortini fingið fýra daga leikbann**

MÁLSVIÐGERÐ
*Jákup Mørk*

Týskvøldið í farnu viku gjørdi kappingarnevndin hjá FSF av, at Jóhannis Joensen hjá HB skuldi dømast fýra daga leikbann fyri reyða kortið, sum hann fekk í landskappingardystinum móti NSÍ.

Í hósdagsútgávu okkara skrivaðu vit tá, at í HB høvdu tey ikki ætlanir um at gera meira við hetta málið, og soleiðis skuldi verið líkt til, at málið var endaliga avgreitt.

## Ákæra og dómur líkjast ikki

Í kjalarvørinum á málinum hava tó fleiri spurningar stungið seg upp, og fleiri teirra benda eisini á, at málsviðgerðin í málinum ikki hevur verið heilt soleiðis, sum hon plagar at vera í líknandi málum.

Tað, sum kappingarnevndin skuldi taka støðu til, sambært teimum upplýsingum, sum Sosialurin hevur móttikið, er at dómarin í frágreðing sínari hevur skrivað, at leikarin hevur skallað seg, og at hann tískil fekk reyða kortið. Hetta er sjálvandi eitt álvarsamt brot á fótbóltslógirnar, og fordømi fyri slíkar gera bendu á, at talan helst hevði verið um einar átta dystir uttan fyri síðulinjurnar, um leikarin varð funnin sekur.

Úrskurðurin hjá kappingarnevndini gjørdist tó ein heilt annar. Jóhannis Joensen varð nevnliga dømdur leikbann í fýra dagar fyri atburðin, sum hann sýndi, eftir at hann hevði fingið reyða kortið. Tað vil siga, at samsvar als ikki er ímillum ákæruna, sum varð reist, og dómin, sum varð feldur.

Hetta bendir ikki á tað borðið, at kappingarnevndin hevur tikið støði í frágreiðingini frá dómaranum, og í øllum førum er leikarin ikki dømdur eftir ákæruni í hesum.

Spurningurin er so, um hetta er nakað, sum føroyskir dómarar kunnu liva við. At atlit ikki verður tikið til teirra støðu í slíkum málum. Vit royndu sunnudagin at fáa eina viðmerking frá Niklas á Líðarenda, ið var dómari í dystinum millum HB og NSÍ, men hann sigur seg onga viðmerking hava til málið í løtuni.

## Skuldi verið einfalt

Um so er, at kappingarnevndin ikki hevur mett, at leikarin er skyldugur í ákæruni, átti málið sum so ikki at verið nakar trupulleiki. Hevur leikarin ikki framt brotið, sum hann er ákærdur fyri, skuldi talan ikki verið um aðra revsing enn leikbann í ein leikdag, soleiðis sum kappingarreglurnar áseta.

At leikarin so kortini verður revsaður við fýra døgum, sigur so mikið sum, at kappingarnevndin undir viðgerð síni helst hevur tikið atlit til aðra próvførslu – eitt nú sjónbandaupptøku - enn tær skrivligu frágreiðingar, sum partarnir hava sent inn í málinum.

Er tað so, at Jóhannis, verður fríkendur fyri ákøruna, grundað á videoupptøkur, svarar hetta sum so spurninginum um, hvør próvførsla er nýtt, men hetta setir so aftur tveir nýggjar spurningar.

Áður hevur kappingarnevndin nevnliga gjørt av, at teimum ikki nýtist sjónbandaupptøkur av hendingum, sum nevndin skal taka støðu til, men við hesum hevur nevndin so broytt støðu hesum viðvíkjandi.

Er hetta nakað nýtt í málsviðgerðini hjá FSF, so er tað ikki minni nýskapandi, at kappingarnevndin nú eisini tekur sær heimild til at viðgera hendingar, sum nevndin ikki er biðin um at taka støðu til. Hetta kann helst samanberast við, at ákæra verður reist um neyðtøku, men at dómarin so ger av, at hin ákærdi skal dømast fyri innbrot.

Ikki tí. Kappingarreglurnar geva FSF heimild til at taka mál upp av sínum eintingum.

Í §38, stk. 3, í kappingarreglunum stendur, at FSF sjálvt kann taka mál upp til viðgerðar. Í somu grein stendur tó eisini, at hetta bert kann gerast undir serligum umstøðum, tá eitt felag hevur framt brot á kappingarreglunar, og at felagið tá skal hava boð um hetta, áðrenn viðgerðin fer fram.

Ivasamt er tó, um hendan reglan kann nýtast hesum málinum. Fyrst og fremst tí tað ikki er felagið, HB, sum hevur framt nakað misbrot í málinum. Harafturat kemur, at atburðurin hjá Jóhannisi Joensen eftir útvísingina neyvan hevur verið av somikið serligum slag, at hetta hevur rættvísgjørt nýtslu av hesum lógartekstinum, og sum vit hava skilt, hevur eingin kunning verið ímillum FSF og HB í tíðarbilinum frá at HB hevur latið sína próvførslu inn, fram til ta løtu, at dómur er feldur í málinum.

## Onga viðmerking

Sunnukvøldið fingu vit orð á formannin í kappingarnevndini, Børge B. Hansen, men hann sigur seg onga viðmerking hava til málið. Heldur ikki var nakað svar at fáa, tá vit spurdu hann, um Jóhannis Joensen ikki er ákærdur fyri eitt og dømdur fyri nakað annað.

Í HB hava tey enn ikki tikið endaliga støðu í málinum. Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur, sigur, at tosað hevur aftur og fram um málið, men hann roknar tó ikki við, at farið verður víðari við hesum.

## Kann enn kærast

Samanumtikið tykist tað soleiðis, at júst hetta málið inniheldur meira enn bert eina støðutakan um, hvørt leikari er skyldugur í einum broti ella ikki.

Í øllum førum tykist talan vera um ein nýggjan framferðarhátt í arbeiðinum hjá kappingarnevndini. Nevndin hevur við hesum tikið sær sjálvum víðari rásarúm enn vanligt, og spurningurin er so, hvønn týdning hetta kann fáa fyri málsviðgerðina hjá nevndini framyvir.

Sum nevnt omanfyri, so tykist HB ikki hava ætlanir um at kæra úrskurðin hjá kappingarnevndini til dómsnevndina. Niklas á Líðarenda, sum var dómarin, ið skrivaði frágreiðingina, sigur seg onga viðmerking hava til málið. Heldur ikki tá spurt varð, um hann ætlar sær víðari við hesum. Um so er, verður helst meira at frætta í næstum, tí freistin fyri at kæra málið víðari var úti á midnátt mánakvøldið.